# Skal sita í fongsli

Amerikanararnir krevja, at ein libyskur yvirgangsmaður, sum er situr í fongsli í sambandi við Lockerbie-atsóknina, skal verða sitandi í fongslinum. Ein dómstólur í Skotlandi kom í síðstu viku til ta niðurstøðu, at Ali Mohmet al-Megrahi kann fáa grið, tí hann er illa sjúkur av krabbameini. Men Robert Gibbs, sum er talsmaður fyri Hvítu Húsini, sigur nú, at USA er ímóti, at maðurin fær grið. Ali Mohmet al-Megrahi fekk lívlanga fongsulsrevsing fyri at hava verið við til at leggja eina bumbu umborð á eitt amerikanskt flogfar, sum sprongdist uppi yvir skotyska býnum Lockerbie í 1988. 270 fólk doyðu. Libyski maðurin hevur alla tíðina noktað seg sekan.



# Karzai ódámligan stuðul

Fyri at tryggja sær sigurin á forsetavalinum í morgin hevur afghanski forsetin, Hamid Karzai, útvega sær stuðul frá fleiri heldur ivasomum leiðarum so sum tí illa gitna herleiðaranum Abdul Rashid Dostum. Hann er fyrrverandi generalur og tiltikin fyri sína harðrendu framferð og er fleiri ferðir skuldsettur fyri grov brot á altjóða mannarættindini. Dostum býr í útlegd í Turkalandi, men er nú í Afghanistan og eggjar fólki til at velja Karzai. Eygleiðarar halda, at hansara stuðul kann útvega sitandi forsetanum eina hálva millión atkvøður.

# Obama

um, at tað er ikki skilagott at fáa seks til átta børn, tá ið tey ikki hava ráð at forsyrgja fleiri enn tveimum.

Alt gekk væl við at fáa viðurkenning fyri ætlanini.

Í apríl í ár fór Oluf Mortensen aftur til Kenya, og hesa ferð fóru tey tvey fólk fleiri úr Danmark.

## Ger stóran mun

- Tað var hent nógv, síðan vit vóru har tvey ár frammanundan, og hetta segði okkum, hvussu gagnligt slíkt arbeiði er, sigur Oluf Mortensen.

Stuðulin úr Føroyum í ár fór m.a. til at keypa uppvørpu, hátalarar o.a., alt drigvið við agregati, ti streymveiting er eingin. Hendan útgerð er neyðug í upplýsingararbeiðnum fyri at basa sjúkuni.

Felagsskapurin Vest-Kenyas Venner ger eitt stórt arbeiði í Danmark til frama fyri fótbóltsskúlan og hini tiltøkini í Vesturkenya. Tey hava havt skúlarenning í Danmark, og felagsskapurin teknar limir, sum gjalda limagjald. Aftur fyri kunnu limirnir fara til økið og gista í smáttum, sum gjørdar eru til gestir.

## Hjálp til sjálvhjálp

Oluf Mortensen dámar væl henda mátan at veita menningarhjálpt.

- Vit koma ikki við einum bunka av peningaseðlum. Í staðin royna vit at læra tey at liva meira skipað og at fyribyrgja seg móti HIV-smittu.

Tá ið fótbóltsskúlin og hini tiltøkini vóru av, hildu fyriskipararnir frí í nakrar dagar eftir seks harðar dagar við arbeiði frá morgni til myrkurs.

## Ansa væl eftir ommuni

Ein av teimum døgunum fekk Oluf Mortensen høvi at fara at vitja ommu Barak Obama, sum búði 30 minuttir at koyra frá bygdini, har fótbóltsskúlin var.



*Øll børnini fingu mat, meðan tey vóru í fótbóltsskúlanum, og matgerðin gav arbeiði til fleiri kvinnur teir dagarnar. Hesar kvinnurnar sluppu við at vitja ommu Obama, og hjá nógvum var hetta fyrstu ferð, tær vóru heimanifrá*

Omman eitur Sara Obama og er mamma pápa Barak Obama.

Gestirnir skuldu gjøgnum nógv trygdarlið fyri at sleppa at vitja. Eina ferð hevur verið innbrot hjá ommuni, og tí ansa bæði vaktir og politistar væl eftir 24 tímar um samdøgrið.

- Vit skuldu vísa pass og vera væl klødd. Eg var møttur i ov stuttum sjorsum og noyddist tí at skifta, sigur Oluf Mortensen.

Tey vórðu víst inn í ein urtagarð niðan fyri hús hennara, og har skuldu tey bíða.

Hús hennara vóru ein smátta, sum landsmyndugleikarnir hava bygt uppí fyri hana. Streymveiting var til hennra hús, men vatn hevði omman ikki. Í mun til hini var hon væl fyri, men hon hevði valt at liva sum hini.

## Ein blíð omma

- Tá ið vit høvdu bíðað í okkurt um ein hálvan tíma, kom ein prúð kona í nýmótans sandalum raggandi omaeftir. Henda 86 ára gamla konan kom smílandi og setti seg niður. Mamma Sarah fortaldi á sínum máli, og ferðaleiðarin umsetti. Hon skilti tó enskt, sigur Oluf Mortensen.

Fyri hann var tað ógvuliga rørandi at hoyra ommuna greiða frá sambandinum við ommusonin, sum nú er forseti í USA. Barak Obama hevur fleiri ferðir búð hjá ommuni í Kenya, og tey bæði standa hvør øðrum nær. Omman fortaldi, at Barak Obama longu sum smádrongur setti sær fyri at blíva til nakað. Hann hevur veruliga stríðst, segði tann erna omman.

Oluf Mortensen fekk eisini høvi til at seta seg hjá ommuni, tosa um fótbóltsskúlan, sum hon visti um, og siga, hvaðani hann kom. Hann fortaldi henni, hvussu vakrar Føroyar vóru, og hon svaraði:

- It must be at very pretty place.

Sama dag sum tey vitjaðu ommuna, hevði hon tosað í telefon við ommusonin í Hvítu húsunum.

- Henda løtan var fyri meg nógv størri enn at hava tikið í hondina á Bill Clinton og øðrum mætum fólk, sigur Oluf Mortensen.

Fastir Barak Obama fingu tey eisini høvi at heilsa uppá. Hon er sjálv við í eini aðrari verkætlan, sum er ein kvinnurørsla, ið somuleiðis arbeiðir við at upplýsa um fyribyrging móti AIDS.

## Gera meira

- Eg ætli mær avstað aftur, tí tað var so stór uppliving. Eingin, sum ikki hevur verið har, kann ímynda sær, hvussu illa stendur til. Mangan bæði grótu og flentu vit at vánaligu umstøðunum, sigur Oluf Mortensen.

Hann leggur aftrat, at VestKenyas Venner heldur fram við at víðka verkætlanina. Roynt verður at fáa fótbólt inn á timatalvurnar í skúlanum og at undirvísa kvinnum i reinføri.

Oluf Mortensen er fegin um stuðulin, sum Uttanríkisráðið hevur veitt, og hann rósar fulltrúanum Barbaru á Tjaldafløtti fyri góðan samstarvsvilja.



*Eldsálin í VestKenyas Venner eitur Ruth Lange. Hon hevur selt hús síni og læt felagsskapin fáa peningin av søluni. Her situr hon við grøvina hjá pápa Barak Obama. Grøvin er beint við húsini hjá mammu hansara*




*Plakatir vórðu eisini settar upp fyri at fáa børn og ung at skilja, hvssu neyðugt tað er at fyribyrgja seg móti HIV/AIDS*



*VestKenyas Venner hevur gjørt ymist annað í bygdini. Hetta er ein vatnbrunnur*